# Nýggjur Volvo V70


*Nýggi Volvo V70 fær premieru á altjóða bilaframsýningina í Geneve í mars mánað*


*V70 er ein luksusbilur við hópin av innbygdum trygdarskipanum. WHIPS (Whiplash Protection System) nakkastútturnar hjá Volvo sigast at vera millum heimsins tryggastu*


*Eins forgangarin hevur hesin stórar baklyktir til frama fyri ferðslutrygdina*

**Á altjóða bilaframsýningina í Geneve í mars verður ein heilt nýggjur Volvo V70 sýndur fram. V70 verður einans gjørdur sum stationcar. Bilurin kemur á skandinaviska marknaðin í august 2007**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Seinni í ár kemur ein heilt nýggjur Volvo V70 á marknaðin. Bilurin, ið einans verður gjørdur sum stationcar, verður ein av tryggastu bilunum á marknaðinum - ein luksusbilur við hópin av innbygdum trygdarskipanum.

Hóast designið minnir nógv um núverandi V70, er hesin ein heilt nýggjur bilur.

Beinplássið við baksetrini eru betur enn á núverandi V70 og familjur við smáum børnum kunnu sum eykaútgerð velja innbygd barnasetur, sum kunnu stillast í hædd og trygdarbeltini eru altíð í rættar hædd í mun til støddina á barninum. Innrættingin er liðilig og praktisk við t.d. baksetri, sum kann leggjast saman deilvíst.

Nógv er eisini gjørt burtur úr at bilurin skal vera arbeiðsligur og brúkaravinarligur. Viðførisrúmið er vaksið við 55 litrum í mun til núverandi V70.

Sum nakað nýtt fæst V70 við tveimum nýggjum 6-syl. bensinmotorum við ávikavist 238 hk og 285 hk (T6) umframt teir vanligu økonomisku bensin- og dieselmotorarnar.

V70 hevur fleiri innbygdar skipanir fyri at so vítt gjørligt at umgangast ferðsluóhapp, sum t.d. framkomin koyri- og supportsystem, ið arbeiða saman á ein intelligentan hátt fyri at hjálpa bilføraranum undir truplum umstøðum. Eisini er nógv gjørt burtur úr trygdini, um bilurin t.d. verður ákoydur frá síðuni. WHIPS (Whiplash Protection System) nakkastútturnar hjá Volvo sigast at vera millum heimsins tryggastu.

Tað eru ikki bert tey sum koyra í Volvo V70, sum eru væl vard, eisini er nógv gjørt burturúr at verja fótgangarar, súkklistar og onnur, sum ferðast í ferðsluni. Bilurin er soleiðis uppbygdur framman at kúfangarin og motorhjálmurin geva eftir um ein persónur verðu ákoyrdur fyri at minka um vandan fyri álvarsliðum skaðum.

Ljóðanleggini í Volvobilunum eru í heimsklassa, og hesin nýggi V70 hevur ljóðanlegg við forsterkara frá Alpine, Dolby Pro Logic II Surround og hátalarar frá Dynaudio.

Nýggi V70 kemur á skandinaviska marknaðin í august 2007.






FDM í Roskilde:

## KTI eitur nú FDM Sjællandsringen

Koyritekniska breytin í Roskilde KTI (KøreTeknisk Institut) eitur nú "FDM Sjællandsringen". Tað var í fjør at FDM keypti breytina frá KTI. Teir eiga eisini koyritekniska breytina "FDM Jyllandsringen".

Koyritekniska breytin verður m.a. nýtt til at geva teoretiska og praktiska undirvísning í koyriteknikki fyri fólki, sum eru við at taka koyrikort og til koyriteknisk skeið fyri meira royndar bilførarar.

Tað er ikki so langt síðan, at nógvir føroyingar vitjaðu hesa koyritekniska breytina, tá Ráðið fyri Ferðslutrygd skipaði fyri einum túri við fullsettum flogfari til júst hesa breytina í Roskilde í 2005.



*Koyritekniska breytin í Roskilde KTI (KøreTeknisk Institut) eitur nú "FDM Sjællandsringen"*


